almannaverkið

Almanna- og Heilsumálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Tórshavn, tann: 19. desember 2025
J.nr.: 600.K04-0040/25-4
(at tilskila í svari)

Tygara skriv.:

Viðgjørt: Janus Hentze í Stórustovu

Viðv. uppskoti til løgtingslóg um bráðfeingis bústaðir og serreglur á almannaøkinum fyri burturriknar ukrainar

Almannaverkið hevur tann 21. november 2025 móttikið uppskot til løgtingslóg um bráðfeingis bústaðir og serreglur á almannaøkinum fyri burturriknar ukrainar til hoyringar.

Av § 8 í uppskotinum framgongur, at Almannaverkið ávísir persónar til bráðfeingis bústað, meðan Landsverk og Almannaverkið sambært § 9 kunnu krevja, at persónur flytir í annan bústað. Almannaverkið metir, at tað kann gerast heldur ógreitt, um tveir myndugleikar hava heimild at krevja hetta. Mælt verður til, at tað einans er Almannaverkið, ið kann krevja, at persónur flytir í annan bústað sambært § 9.

Sambært § 10 kann Almannaverkið seta starvsfólk at virka sum sosialur samskipari, og Almannaverkið kann bjóða øðrum at røkja hesa uppgávu. Av viðmerkingunum til ásetingina framgongur, at 'væntandi fer Almannaverkið at gera avtalu við Reyða Kross'. Almannaverkið mælir til at strika hesar viðmerkingar um avtalu millum Almannaverkið og Reyða Kross, av tí at viðmerkingin kann tykjast avmarkandi í mun til sjálvan lógartekstin, og kann skiljast sum ein bundin áheitan á Almannaverkið.

Í § 11, nr. 2 verður heimild fyri at áseta reglur um, at ukrainar kunnu fáa stuðul sambært kap. 3 og 4 í lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk. Hevur Almanna- og Heilsumálaráðið umhugsað at seta kap. 8 um leiðbeinaraskipan inn her? Leiðbeinari kann játtast til persónar, ið eru fevndir av § 9 í lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, so á tann hátt kann leiðbeinari játtast til ukrainar, ið eru fevndir av hesi lóg. Leiðbeinari kann tó sambært lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk eisini játtast til persónar, ið eru í vanda fyri at missa tilknýtið til arbeiðsmarknaðin, uttan at hesir persónar annars eru fevndir av nøkrum arbeiðsfremjandi tiltaki. Um landsstýrisfólkið ásetir reglur sambært § 11, nr. 2 í uppskotinum við núverandi orðing, kann leiðbeinari ikki játtast ukrainum, sum ikki eru í tilboði eftir kap. 3 og 4 í lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk.

Á síðu 4 í almennu viðmerkingunum framgongur, at § 3, stk. 2 í lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk setir krav um danskan heimarætt. Her verður helst sipað til § 2, stk. 2. Ásetingin setir tó ikki krav um danskan heimarætt, men kravið er, at útlendingar hava varandi uppihaldsloyvi. Er talan um tíðaravmarkað arbeiðs- og uppihaldsloyvi, eru útlendingar ikki fevndir av lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk. Heimarættur er ikki eitt krav sambært lógini.

Vegna Almannaverkið

Janus H. í Stórustovu
fulltrúi